# ítróttur

Nr. 111 • mikudagur • 15. juni 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

KÍ-Skála:

# Klaksvíkingar eru sperdir

**Manningin er so mikið lítil, at tað er neyðugt at hava unglingar og dreinir á beinkinum, tá ið farið verður út á Skála, har teir manningarliga eru væl fyri**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*



*Í fjórða umfarinum í ár vann Skála tryggan 2-0 sigur í Klaksvík*

Klaksvíkingar eru ikki væl fyri undan ferðini út á Skála í kvøld. Dysturin er í skipanini framskundaður frá vikuskiftinum, tí Skála stendur á gáttuni til fyrstu altjóða uppgávuna nakrantíð. Teir skulu spæla í Intertoto.

Eitt er, at KÍ ikki hevur fingið stig burturúr tveimum teimum seinastu royndunum, sum hava verið ímóti EB/Streymi og GÍ. Eitt annað er, at manningarliga grundarlagið er lítið. Veteranarnir Allan Joensen og Eyðun Klakstein eru skaddir. Ein annar veteranur, Jan Andreassen, er leikbannaður eftir reyða kortið ímóti GÍ.

Á beinkinum ímóti GÍ vóru bara blaðungir spælarar. Tað kann væl vera, at onkur teirra fer at fáa møguleikan frá fyrsta bríksli í kvøld. Kanska verður tað Tórður Lervig. Ein møguleiki at fylla holið í miðverjuni eftir Jan Andreassen er at flyta Ova Nysted aftur. Síðani Oddbjørn Joensen gjørdist venjari, hevur Ovi verður í álopinum, men tað hevur knípt við málskjótingini. Erling Fles hevði verið upplagdur avloysari í fremstu røð, men hann er ikki tøkur orsaka av lærskaða, og Julian Samuelsen, sum hevur roynst væl løturnar, hann hevur fingið á vøllinum, er heldur ikki tøkur.

Á Skála iðra teir seg um, at tað ikki eydnaðist at fáa øll stigini í Fuglafirði. Fyrr í ár hava teir fingið øll stigini ímóti KÍ. Teir vunnu 2-0 í Klaksvík í fjórða umfarinum.

Manningarliga er Skála so væl fyri, sum tað ber til. Sunnudagin helt rumenski Jenel Bárði Danielsen uttanfyri teir fyrstu ellivu.

Pauli G. Hansen var ikki við í Fuglafirði. Skaðin í lærkrikanum, sum hevur argað seinastu árini, tá ið nógv hevur verið á skránni, hevur vitjað aftur. Sunnudagin spældi Pauli tó allar 90 minuttirnar við 3. deildarliðnum, sum vann 5-1 á heimavølli ímóti B68, og hann verður í hópinum í kvøld.

Dysturin á Skála verður klokkan 19, og tað verður Páll Augustinussen, sum skal døma.

## Ingi skal venja Neistan

Nú er greitt, at Ingi Olsen fer at halda fram sum venjari hjá besta kvinnuliðnum hjá Neistanum. Ingi tók við venjarasessinum eftir Flemming Raben seint í farna kappingarári, og nú eru partarnir komnir ásamt um at leingja samstarvið, so tað eisini er galdandi fyri hetta kappingarárið, ið liggur fyri framman.

tn

# Svimja um Skálafjørðin

**Svimjifelagið FLOT bjóðar til svimjing um Skálafjørðin tann 3. juli 2005. Ætlanin er at svimja um sjálva gáttina til Skálafjørðin, av Strondum yvir á Toftir. Nágreiniliga rutan er ikki avgjørd enn; men tað verður ein teinur á millum 600 og 1400 metrar, alt eftir hvar vit byrja og enda.**

TÍÐINDASKRIV

Allir luttakarar mugu útvega sær froskmannabúna at svimja í. Vátdrakt er best; men tað er eisini loyvt at nýta turrdrakt, um svimjarin tá eisini nýtir bjargingarvest. Svimjarin eigur at royna draktina hjá sær, áðrenn tiltakið.

### Ætlað sum heilsutiltak

FLOT átekur sær at skaffa fylgibátar og aðrar umstøður runt svimjingina; tvs. sovorðið sum flutningur av Toftum yvir til startin á Strondum, skiftiumstøður har og á Toftum, neyðhjálp, matur og drekka á Toftum, o.t.

Tiltakið er ikki ætlað at verða ein kapping sum so, men heldur eitt heilsutiltak ella roysni til okkum øll at royna. Men tó so verða heiðursmerki givin trimum teimum bestu monnunum og kvinnunum. Og øll sum leggja frá landi, fáa eina T-shirt sum prógv um, at tey royndu teinin.

Áhugaði kunnu lesa meira á heimasíðu okkara - http://flot.info - ella ringja til Rók í Jákupsstovu, á tlf 219754. Á heimasíðuni er m.a. ein stutt 'tónleika-video' frá seinastu Skálafjarðarsvimjing

# Kyndil styrkir kvinnuliðið

**Í Kyndli ætla tey, at kvinnuliðið hjá felagnum skal bíta meiri frá sær komandi kappingarár, enn hvat liðið gjørdi í fjør**

HONDBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Kyndil endaði næstaftast í Sunset-kappingini farna kappingarár, og mangan løgdu tær grønklæddu rygg til lemjandi ósigrar. Soleiðis skal ikki verða komandi kappingarár, og tí hevur liðið nú leitað sær styrk.

### Lina aftur í Havn

Størsti styrkurin, ið Kyndil higartil hevur ognað sær undan komandi kappingarári, er ivaleyst sterki bakkurin Lina Andriulyte, ið farna kappingarár spældi í Søljuni, men sum áður eisini hevur spælt við Neistanum í Havn. Eingin ivi er um, at Lina er ein góður styrkur fyri eitthvørt lið í landinum, og við henni á liðnum hevur Kyndil økt munandi um skotstyrkina.

Harafturat fer Jórun Ludvig aftur til barndómsfelagið, eftir at hon hevur verið í útlegd í bæði VÍF í Vestmanna og í Neistanum. Jórun er ógvuliga royndur spælari, og tað er eingin loyna, at Kyndlamanningin annars er rættuliga ung, og tí kann tað hava stóran týdning at fáa ein so royndan spælara sum Jórun við á liðið.

Sum skilst er tað ikki óhugsandi, at liðið fær fleiri styrkir, men enn er einki greitt hesum viðvíkjandi. Venjari hjá Kyndlakvinnunum verður eins og í fjør Geir Wardum.